## DAGSINS MEINING

# Meðan vit bíða

Landsstýrismaðurin í fíggjarmálum hevur boðað frá, at hann leggur uppskotið til fíggjarlóg 2006 fyri løgtingið tann 30. september. Hetta má sigast at vera í evstu løtu, og tað týður uppá, at tað hevur verið torført at finna semju í samgonguni um uppskotið. Einki er likið út um komandi uppskotið, men av gomlum royndum vita vit, at fíggjarlógin vanliga er størsti trupulleikin hjá einari samgongu, sum røkkur tvørtur um miðjuna í politikki.

Hesir trupulleikar eru fleiri. Teir er hartil ideologiskir og snúgva seg um øki, har flokkarnir hava tungt við at slaka. Borgarligu flokkarnir hava sum hjartamál ella beinleiðis dogmur, har teir hava trupult við at boyggja av. Hesar dogmur eru t.d. skatturin. Bæði Fólkaflokkurin og Sambandsflokkurin halda, at ein skattalætti í sjálvum sær gagnar samfelagsbúskapinum. Hetta er ein misskiljing. Ein skattalætti kann gagna búskapinum undir ávísum umstøðum, og hann kann gera meira skaða enn gagn undir øðum umstøðum. Flokkar á vinstru hálvu himprast ikki við at taka pengar inn frá skattgjaldarunum til tess at fíggja vælferðarsamfelagið, sum gerst alt tyngri og tyngri í rakstri.

Ein onnur dogma er javnvágin á fíggjarlógini. Tað tykist sum, um borgarligu flokkarnir halda, at javnvág á eini fíggjarlóg er eitt gott mál í sjálvum sær. Hetta er er ein  sera fýrkantað fatan av eini fíggjarlóg. Í tíðum, har búskapurin er upphitaður, eigur ein sjálvsagt ikki at hava hall á fíggjarlógini, tí so ornar búskapurin enn meira. Hin vegin kann tað vera stimbrandi fyri ein búskap, ið er á veg niðureftir, at hava eitt hall við at pumpa almennan pening út í samfelagið. Her kann t.d. vera talan um almennar íløgur, ið geva privatum fyritøkum meira arbeiði, kombinerað við, at ein ikki sparir á almennu fyrisitingini og stovnunum, so arbeiðsloysið ikki økist.

Eisini kann fíggjarlógin verða brúkt beinleiðis sum eitt stuðulsamboð at hjálpa vinnum í trongstøðu. Hetta amboð verður við góðum úrsliti brúkt, serstakliga í ES londum og í EBS londum. Sum dømi kunnu vit nevna, at soleiðis varð svenski bilaídnaðurin bjargaður herfyri. Vit í Føroyum hava fráskrivað okkum hetta amboð, tí í Føroyum er reindyrkaður marknaðarbúskapur vorðin átrúnaður hjá einum heilum ættarliði av ungum búskaparfrøðingum og politikkarum úr at kalla øllum flokkum. Nú fáa vit skjótt at síggja, hvussu fíggjarlógin er sett saman. Samansetingin ger í stóran mun av, um slagsíðan økist, ella um skútan kemur aftur á rættkjøl.  Nú bíða vit, og kunnu bert meðan vit bíða, vóna, at vit og skil ráða í fíggjarmálaráðnum.

**Sosialurin**

## VIÐMERKINGAR

# Kippið ikki hønuna ið verpur gulleggini

**Sámal Jacobsen**
*fiskimaður og skipari*



Føroyski rækjuflotin hevur uppiborið eina vakra minningargrein og ikki ørvitistos um tilfeingisgjøld. Henda fyrr so stolta vinnan hjá rækjumonnum, sum vunnu »reyðargullið« av fjarastu leiðum, av Flemish Cap og undan ísinum við Labrador í vestri upp til vetrarmyrkrið við Svalbard í landnyrðingi. Vinnan, sum í 70- og 80-árunum gav 20-25% av útflutningsvirði til Føroya.

Nú syngur hon sín svanasong. Teir mest bláoygdu tosa um at vinda tilfeingisgjøld úr teimum 2-3 rækjuskipunum, sum kanska verða eftir, um oljan aftur fer at kosta undir 2 kr./l, og rækjuprísurin fer upp um 10 kr./kg. »Frøðingar« og summir tingmenn droyma um at eksperimentera við rækjum sum »ogn Føroya fólk«, ið verður býtt út á skriviborðum í Tinganesi til teir, sum bjóða seg fram at keypa veiðiloyvi og at fiska. Hvør fíggjar íløgurnar?

Men Føroyar eru so hasar 2-300 mió. kr. frá rækjunum fátækari í útflutningsvirði, sum kanska enn høvdu fingist, um rækjuflotin fekk eina FAS-líka skipan, eini 5.000 tons av rækjum meira til keyps frá Grønlandi (ella Kanada), og um oljuprísurin aftur lækkar.

Tingmenn vóru so trekir at lata rækjuskipunum handan stuðulin, at »mens græsset gror, dør horsemor«. Hann blívur kanska »síðsta oljan« ístaðin fyri bjarging hjá rækjuflotanum. So hava teir ikki tann »studningin« at gremja seg um meira.

Men sambært »Visjón 2015« fáa vit granskarar ístaðin fyri rækjumenn. Hvussu man avreiðingarseðilin hjá hesum granskarum fyri fasta, almenna løn fara at roynast kommunu- og landskassanum sammett við tann avreiðingarseðil, okkara rækjumenn kundu leggja á borðið líka til tað síðsta, og sum okkara fiskimenn annars framhaldandi fara at leggja fram. »Tilfeingisgjøld« tosar løgtingið um nú. Prosent og 100-tals milliónir spola upp eftir sjónvarpsskíggjanum, meðan rækjurnar(!) renna úr posanum niður í sliskuna aftan. Nei, tá rækjutilfeingið er søga, tosa akademikarar til fánýtis um tilfeingisgjøld av hesum fiskaslag.

Landgrunnurin hevur til fyri 2 árum síðan givið uml. 1000 mió. kr. í avreiðingarvirði. Kann heimaflotin bera tilfeingisgjøld? Neyvan við verandi fiskaprísum, veiðinøgd og oljuprísum. Tilfeingisgjøld verða steinur oman á byrðu, sum ger, at skipini straks verða bundin við kei.

Tað kann bara blíva »rullumaðurin á Myrkinesgrunninum«, sum rindar hesa tilfeingisleigu av síni hýru? Hvat verður so eftir til hann sjálvan og til útróðrarbátin, línuskipið og partrolaran?

Fiskiflotin hevur hesi seinnu árini havt ta eydnu at hava avlop. Tá rinda feløgini skatt av avlopi og vinningsbýti (um nakað er). Men nú hava, við nøkrum undantøkum, nógvir bátar og skip á heimaleiðum hall av rakstri. Tilfeingisgjald av samlaðum halli gevur hvørki 300, 200 ella 100 mió. kr. í landskassanum um árið. Nógv prosent av 0 gevur eisini 0.

Gamaní hava toskakvoturnar í Barentshavinum eitt ávíst søluvirði, um tær verða handlaðar. Men 40 mió. kr. (um tað er virðið) eru ikki komnar eftir einum degi. Tað hevur tikið 30 ár hjá hesum skipum at fáa hetta kvotavirði - altso »bara« eina góða millión um árið. Tað er kanska ikki burturvið at skatta hesar sølur sum vanlig avlop og/ella vinningsbýti hjá partafeløgum. Men gloym at skatta tær so har, sum onkur kundi hugsað sær, tí so verða ongar sølur.

Nótaflotin starir eisini komandi avmarkingum í eyguni, tá svartkjafturin verður kvoteraður. Landsstýrið skuldi arbeitt fyri at banna fiskiskapi eftir svartkjafti í altjóða sjógvi. So høvdu vit í hvussu er stongt norðmenn inni á egnum øki og havt sum frægast eftir sjálvir í føroyskum sjógvi. Men her verða vit helst líka fittir móti norðmennum, sum vit hava verið móti kanadamonnum á Flemich Cap. Tað gevur einki til okkara - bara til mótpartin.

Føroyski fiskiflotin á nær-, mið- og fjarleiðum kann geva upp til 1.000 mió. kr. í hýrum árliga, tá væl gongst. Í útflutningsvirði kann øll høvuðsvinnan geva max. 3.000 mió. kr. og lønir hareftir. Tað gevur kanska aðrar 1.000 mió. kr. í avleiddum inntøkum.

Hetta er tann helvt av BTÚ, sum Føroyar liva av. Hetta er tað virði, sum heldur øllum øðrum uppi. Uttan fiskivinnuna var øskukalt í Føroyum. Fiskivinnan er hønan, sum verpur gulleggini til allar føroyingar. Hesi »gullegg« eru grundarlagið undir allari vælferð á sjógvi og landi, privat og alment.

Fiskivinnan er sostatt eisini grundarlagið til allar skatta- og MVG-inntøkur hjá tí almenna, hjá landi og kommunum.

Leggja politkarar tilfeingisgjøld á fiskimenn og høvuðsvinnuna oman á allar aðrar skattir og avgjøld, sum hitt almenna livir av, kippa teir hønuna, sum enn verpur gulleggini til allar føroyingar.

Hjúklið heldur um hønuna, gevið henni tað allar besta fóðrið, tit eiga. Kelið fyri henni, so hon verpur so nógv, stór og góð gullegg, sum hon orkar. Alt annað er ørskapur, sum bara menn, ið einki skilja um fiskivinnu og aðra vinnu, kunnu finna uppá.

**Innsent tilfar**

Av tí at vit fáa rættuliga nógv innsent tilfar sendandi – meira enn vit fáa í blaðið – hevur blaðleiðslan verið noydd at gjørt nakrar avmarkingar.

Enn sum áður skal fult navn skal vera undir øllum innsendum greinum – annars verða tær ikki prentaðar. Harnæst tilskila vit okkum rætt til at ikki at taka við tilfar, sum eisini er sent øðrum bløðum ella hevur verið prentað aðrastaðni.

Drúgvar greinar – greinar sum eru longri enn áleið 5.500 tekn, verða raðfestar lægri, og koma bert í blaðið, um pláss er fyri teimum. Tað er ein fyrimunur um vit fáa tilfarið umvegis teldupost ella á diskli.

Sosialurin

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:** Jan Müller
jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:** Eirikur Lindenskov
eirikur@sosialurin.fo
**Fíggjarleiðari:** Tóki Højgaard
toki@sosialurin.fo

**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
Jonhard Hammer jonhard@sosialurin.fo
Teresa Jensen teresa@sosialurin.fo
Finnbjørg Nattestad finnbjorg@sosialurin.fo
Gudny Langgaard gudny@sosialurin.fo

**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
Vilmund Jacobsen vilmund@sosialurin.fo
Snorri Brend snorri@sosialurin.fo
Magnus Gunnarsson maggi@sosialurin.fo
Terji Nielsen terji@sosialurin.fo
Anna V. Ellingsgaard anna@sosialurin.fo
Eydna Skaale eydna@sosialurin.fo
**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo
Terji Nielsen terji@sosialurin.fo
**Myndamenn:**
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo

**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Postsmoga 231
Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo
**Sosialurin í Suðuroy:**
tel. 375364 fax 375464
tel. 228814
e-post: aki@sosialurin.fo
e-post: dagfinn@sosialurin.fo

**Uppseting/prent:**
Uppseting: Føroyaprent
Prent: Prentmiðstøðin
**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin
**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Tórsgøta 1, 100 Tórshavn
Tel. 341800, Fax 341801
**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn
**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo
varp@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan 14[00]

**Lýsingar**

| Freistir: | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Týsdagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Leygardagsblaðið | Frí. kl. 10 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Stødd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39mm og rúmið millum teigarnar er 4mm.

**Innsent tilfar**
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.